Fiskimálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 03-11-2020
Mál nr.: 20/00303-13
Málsviðgjørt:
Eftirkannað: 07-10-2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Fiskidagaskipanin, leingja gildistíðina á rættindum, føroyskir smábátar, tillagingar og fylgibroytingar)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Fiskidagaskipanin, leingja gildistíðina á rættindum, føroyskir smábátar, tillagingar og fylgibroytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 5 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Fyri fiskifar minni enn 15 tons kann landsstýrismaðurin í kunngerð seta treytir fyri sjálvt fiskifarið fyri at fáa fiskiloyvi."

2. Í § 7, stk. 1 og 2 verður "2032" broytt til: "2033".

3. Í § 13, stk. 1, nr. 1-4, § 21, stk. 1 og 3, § 22, stk. 3, § 28, stk. 3, § 30, stk. 1, § 32, stk. 1, 2 og 4, § 33, § 36, stk. 1, § 42, 2. pkt., § 49, stk. 5 og 6, § 50, stk. 1 og 4 verður "§ 19" broytt til: "§ 18".

4. § 18, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"Frá og við 2021 ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð fiskidagatal fyri hvørt fiskiár fyri hesar bólkar av fiskiførum undir føroyskum flaggi í botnfiskaveiðu í føroyskum sjógvi, tó Føroyabanki undantikin:
1) Bólkur 2: Trolarar 501-3000 HK:
   a) Innara fiskidagaleið.
   b) Ytra fiskidagaleið.
2) Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons.
3) Bólkur 4: Útróðrarbátar 15-110 tons á veiðu við línu.
4) Bólkur 4 T: Útróðrarbátar størri enn 40 tons og framtøkumegi minni enn 500 HK á veiðu við troli.
5) Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á veiðu við húki. Undantiknir

eru bátar undir 15 tons, sum eru undir skipan við heimild í § 22, stk. 4.
Stk. 2. Rætturin til fiskidagar sambært stk. 1, nr. 1-5 verður latin teimum, sum í 2019 høvdu henda rætt, ella teimum, sum hesin rættur seinni er fluttur til."

5. Í § 18, stk. 3 verður "frá og við 2021" strikað.

6. § 19 verður orðað soleiðis:

"**§ 19.** Landsstýrismaðurin ásetir í sambandi við fiskidagar, sambært § 18, stk. 1, nærri reglur um fiskidagaleiðir, umbýti av døgum millum leiðir og veiðihættir, um at fiskidagar bert kunnu brúkast við fiskiførum við ávísari støddella ávísari framtøkumegi, at fiskidagar bert kunnu brúkast á ávísum leiðum, umframt reglur um flokking av fiskiførum, sum verða mátað upp av nýggjum.
Stk. 2. Fyri bólk 5, sambært § 18, stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin nærri treytir fyri at fáa fiskiloyvi, umframt reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar, hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann fyri hvønn bólk í hvørjum fiskiári seta fiskidagar av til at lata fiskiførum, sum avreiða livur og annan innvøl av fiski. Fiskidagatalið kann í mesta lagi vera 3% av samlaða fiskidagatalinum í hvørjum bólki, ásett við heimild í § 18, stk. 1. Landsstýrismaðurin ásetir treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fiskidagar, sum hvør bólkur, sambært § 18, stk. 1, nr. 1-4, ikki hevur brúkt í fiskiárinum, kunnu flytast til árið eftir, og verða tillutaðir sum felags fiskidagar fyri hvønn bólkin at brúka í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 31. desember, herundir treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum."

7. Yvirskriftin yvir § 20 og § 20 verða strikaðar.

8. Í § 22, stk. 1 verður "sambært §§ 18 og 19" broytt til: "sambært § 18, samanber tó stk. 4".

9. Í § 22 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um at skipa fiskiskap við opnum, føroyskt bygdum, bátum undir 15 tons í bólki fyri seg uttan fyri fiskidagaskipanina, sambært § 18, stk. 1, nr. 5, og ásetir nærri reglur og mannagongdir um atgongd, fiskiloyvi og hvussu fiskiskapurin skal fara fram."

10. § 28, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Veiðiloyvið hjá fiskifari í bólki sambært § 18, stk. 1 og hjá fiskifari, sum hevur rættindi til fiskiskap eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, skipaður við heimild í § 22, undantikin fiskiskapur, ið er skipaður við mest loyvdu veiðu og egnum árskvotum, kann bert flytast, um fiskiorkan ikki økist."

11. § 28, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Skiftir fiskifar við veiðiloyvi eigara, kann veiðiloyvið fylgja fiskifarinum, um nýggi eigarin lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi í hesi løgtingslóg."

12. Í § 31, stk. 1, 2. pkt. verður: "ella fiskiskapur, ið er skipaður við heimild í § 22" strikað.

13. § 32, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Skiftir fiskifar við fiskiloyvi eigara, kann fiskiloyvið fylgja fiskifarinum, um nýggi eigarin lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan

fiskiskap undir føroyskum flaggi í hesi løgtingslóg".

14. § 64, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"1) brýtur § 3, stk. 3, § 4, stk. 1, § 5, stk. 2, § 8, stk. 3, 3. pkt., §§ 11-12, § 13, stk. 1, 5 og 7, § 21, stk. 1 og 3, § 23, stk. 4-6, § 25, stk. 1 og 3, § 26, stk. 1, § 27, stk. 1, § 30, stk. 1-2, § 31, stk. 1-2, § 35, stk. 1, 1. og 2. pkt. og stk. 3, 2. pkt., § 37, stk. 1, § 38, stk. 1, § 39, stk. 1, § 43, stk. 1, § 46, stk. 1 og 2, § 49, stk. 8, § 55, stk. 1, § 56, stk. 1 og 2, § 57, stk. 1 og § 61,".

15. § 64, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Í reglum, ásettar við heimild í § 5, stk. 3, § 9, stk. 4, § 19, stk. 1-3, § 21, stk. 2, § 22, stk. 1, 2 og 4, § 23, stk. 1, § 25, stk. 4, § 26, stk. 2, § 27, stk. 2, § 28, stk. 4, § 29, stk. 6, § 30, stk. 4, § 31, stk. 4, § 32, stk. 5, § 33, § 34, § 35, stk. 2 og 3, § 37, stk. 3, § 38, stk. 3, § 39, stk. 2, § 40, § 41, stk. 2 og 6, § 42, § 46, stk. 3, § 49, stk. 10, § 50, stk. 6, § 52, stk. 1 og 2, § 55, stk. 2, § 56, stk. 3, § 71, 2. pkt., kunnu verða ásettar reglur um sekt."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, samanber tó stk. 2.
Stk. 2. § 1, nr. 2-10, 14 og 15 koma í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið verður lagt fram fyri at broyta sjófeingislógina, so at lógargrundarlag er fyri at fremja politisku ætlanina um at fara burtur frá skipanini við, at Løgtingið á hvørjum ári ásetir fiskidagatal í botnfiskaveiðuni í føroyskum sjógvi, til at tað í staðin er landsstýrismaðurin, sum fær heimild at áseta fiskidagar við kunngerð.

Umframt hetta leggur uppskotið upp til at leingja gildistíðina á veiðirættindum við einum ári. Somuleiðis er neyðugt at tillaga onkrar orðingar í sambandi við, at ætlanin er at broyta skipanina fyri útróðrarbátar undir 15 tons, og at umorða aðrar ásetingar fyri at gera tær greiðari, og fyri at tær samsvara betur við upprunaligu ætlanina.

1.2. Galdandi lóggáva

Eftir verandi skipan verður fiskidagatalið fyri bólkar av fiskiførum í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi ásett við lóg. Fiskidagaskipanin er einasta skipanin í føroyskum fiskiskapi, har árligu fiskimøguleikarnir, býtið millum bólkar av fiskiførum og reglur um, hvar og hvussu veiðimøguleikarnir kunnu brúkast verður ásett við lóg. Fyri allan annan føroyskan fiskiskap er tað landsstýrismaðurin, sum hevur heimild at áseta kvotur, reglur um, hvør sleppur upp í part, hvussu býtt verður millum skipabólkar o.s.fr.

Í samgonguni er semja um at fara burtur frá skipanini, at Løgtingið á hvørjum ári ásetir fiskidagatal. Ístaðin skal tað vera landsstýrismaðurin, sum fær lógarheimild at áseta fiskidagatal og aðrar reguleringar í sambandi við fiskidagaskipanina.

Í sambandi við ætlanina at broyta skipanina fyri útróðrarbátar undir 15 tons, er longu heimild hjá landsstýrismanninum at gera tað við kunngerð, men fyri at gera ásetingarnar greiðari og meira gjøgnumskygdar, er tørvur á at nágreina onkrar orðingar.

Harumframt er komið eftir, at í galdandi lóggávu eru onkrar ásetingar ikki nóg neyvar og greiðar, og at tørvur tí er á at umorða hesar.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Høvuðsendamálið við uppskotinum er at broyta sjófeingislógina fyri at kunna seta í verk politisku ætlanina um, at tað frá og við 2021 er landsstýrismaðurin, sum fær heimild at áseta fiskidagatalið við kunngerð og at áseta reglur viðvíkjandi fiskidagaskipanini.

Endamálið við uppskotinum er eisini at leingja gildistíðina á veiðirættindum við einum ári.

Harumframt er neyðugt at tillaga onkrar orðingar í sambandi við, at ætlanin er at broyta skipanina fyri útróðrarbátar undir 15 tons og at umorða aðrar ásetingar, so tær eru greiðar og samsvara við upprunaligu ætlanina.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Hetta lógaruppskotið snýr seg um at gera hesar broytingar í sjófeingislógini:

- Tann størsta broytingin er, at frá og við 2021 fær landsstýrismaðurin heimild at áseta fiskidagar við kunngerð. Í verandi lóg er dagatalið ásett í lógini. Við uppskotinum fær landsstýrismaðurin eisini heimildir at fyrisita fiskidagaskipanina, sum kunnu javnsetast við tær heimildir, hann hevur at skipa allan annan føroyskan fiskiskap.

- Skipanin, sum flytur óbrúktar fiskidagar til at brúka fiskiárið eftir, heldur fram, men frameftir verður tað landsstýrismaðurin, sum setir skipanina í verk við kunngerð.

- Skipanin við sonevndu livradøgunum, har fiskifør fáa eyka fiskidagar, um tey avreiða livur, verður víðkað til eisini at fevna um annan innvøl.

- Ætlanin er at broyta skipanina fyri útróðrarbátar undir 15 tons, soleiðis at opnir, føroyskt bygdir, bátar verða tiknir úr fiskidagaskipanini og skipaðir í ein nýggjan bólk fyri seg. Til tess er neyðugt at tillaga lógartekstin nakað.

- Gildistíðin á veiðirættindum verður longd við einum ári frá 1. januar 2021 at rokna.

- Onkrar ásetingar verða broyttar og umorðaðar, so tær eru greiðar og samsvara við upprunaligu ætlanina.

Fiskidagar ásetast við kunngerð
Síðani 1996, tá fiskidagaskipanin í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi varð sett í verk, hevur tað verið Løgtingið, sum við lóg á hvørjum ári hevur ásett fiskidagarnar fyri bólkarnar av fiskiførum í heimaflotanum. Hetta er eisini gjørt í galdandi lóg, har fiskidagar fyri fiskiárið 2020 eru ásettir í lógini.

Tá uppskotið til lógina varð lagt fram, var boðað frá, at frá og við 2021 er ætlanin at broyta skipanina, so at tað verður landsstýrismaðurin, sum fær heimild at áseta fiskidagar við kunngerð, ístaðin fyri Løgtingið.

Við hesum uppskoti verður lógin broytt og tillagað, fyri at fráboðaða politiska ætlanin hjá samgonguni kann setast í verk. Broytingin ber í sær, at heimildir verða lagdar til landsstýrismannin, so at fiskiskapurin undir dagaskipanini fyri tað mesta verður skipaður við kunngerð. Tó er bólkauppbýtið í dagaskipanini varðveitt í lógini.

Í galdandi lóggávu er tað einans í fiskidagaskipanini, at Løgtingið ásetir ítøkiligar fiskimøguleikar. Í øllum øðrum førum er tað landsstýrismaðurin, sum hevur heimild at áseta fiskidagar, kvotur og reglur um, hvussu fiskiskapurin annars skal fara fram.

Samgongan er samd um, at tá landsstýrismaðurin ásetir fiskidagar, skal tað gerast eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu. Endamálið við hesum er at fyrisita fiskidagaskipanina á ein hátt, sum stuðlar undir stovnsrøkt, lívfrøðiliga, búskaparliga og vinnuliga burðardygd. Umsitingarætlanin sjálv er ikki beinleiðis partur av lóggávuni, og verður ikki sett í verk við lóg ella kunngerð. Hon er ein politisk langtíðarsemja, ið setir politisku karmarnar, og er amboðið at brúka, tá árliga dagatalið verður ásett.

Í mai 2019 læt ein arbeiðsbólkur landsstýrismanninum uppskot um at fyrisita fiskiskapin eftir toski á landgrunninum, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu. Uppskotið varð gjørt til ta fiskidagaskipan, sum bólkurin mælti til skal vera høvuðsamboðið í stýringini av fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa. Frágreiðingin frá arbeiðsbólkinum er løgd við hesum uppskoti sum fylgiskjal 2.

Bulurin í umsitingarætlanini, sum bólkurin skjýtur upp, er veiðireglan. Veiðireglan skal stuðla undir, at fiskastovnarnir varandi kasta sum mest av sær. Hon er frymilin, sum árliga fiskidagatalið verður ásett eftir, og hevur sum mál at stýra fiskiskapinum (veiðitrýstinum), so at vit eru innan fyri ásettu mørkini í veiðiregluni. Veiðireglan er í tveimum. Skilt verður ímillum fiskidagar til upsa (bólkur 2) og fiskidagar til tosk/hýsu (bólkur 3-5). Sostatt skal bera til at stilla dagarnar fyri ávikavist bólk 2 og bólk 3-5 alt eftir, hvussu stovnarnir eru fyri, og hvussu nógv royndin er. Vísa metingarnar til dømis, at upsastovnurin er væl fyri, og at veiðitrýstið er niðan fyri ásett mark, so kann dagatalið vera óbroytt ella hækkast fyri bólk 2, ið vanliga mest fiskar upsa, meðan talið hjá hinum bólkunum ikki verður broytt. Eftir uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum verður fiskidagatalið tó ongantíð sett meira enn fimm prosent lægri ella hægri enn í fiskiárinum frammanundan. Hetta skal tryggja vinnuni ávíst støðufesti í árligu fiskimøguleikunum.

Samgongan tekur undir við leistinum í uppskotinum frá arbeiðsbólkinum. Við onkrum smávegis tillagingum verður uppskotið grundarlagið undir teirri umsitingarætlan, sum fiskidagar fyri 2021 og frameftir verða ásettir eftir.

Taka vit samanum, so er hetta lógaruppskotið ein liður í ætlanunum hjá samgonguni at broyta skipanina fyri at áseta fiskidagar í dagaskipanini fyri botnfisk í føroyskum sjógvi. Við uppskotinum verður farið frá skipanini, har tað er Løgtingið, sum á hvørjum ári ásetir fiskidagar, til eina skipan, har tað verður landsstýrismaðurin, ið ásetir fiskidagatalið eftir hesi mannagongd:

1. Havstovan letur fyrst í november á hvørjum ári landsstýrismanninum tilmæli um fiskidagar samsvarandi veiðiregluni.

2. Landsstýrismaðurin ger uppskot um fiskidagar fyri komandi fiskiár samsvarandi umsitingarætlanini og veiðiregluni og ráðførir seg í tí sambandi við umboð fyri vinnuna, fiskifrøðina og fiskiveiðieftirlitið.

3. Landsstýrismaðurin ger uppskot til kunngerð um fiskidagar, ið formliga staðfestir fiskidagatalið, og sum verður avgreitt eftir vanligu mannagongdini fyri hoyring, eftirkanning, landsstýrisfund og lýsing.

Mett verður, at broytta skipanin fer at stuðla undir opinleika og gjøgnumskygni, og at fiskidagatalið verður ásett í kunngerð eftir fyrisitingarligum treytum. Broytingin ber eisini í sær, at fiskidagaskipanin kemur at vera undir líknandi lógarkarmum, sum eru fyri allan annan føroyskan fiskiskap, eitt nú fyri fiskiskapin eftir makreli, svartkjafti, norðhavssild og botnfiski í Barentshavinum. Kunngerðarformurin verður vanliga eisini roknaður sum ein smidligari leistur at fyrisita eftir, serliga tí tað er skjótt at stilla og broyta regluverkið, t.d. um okkurt er komið skeivt fyri, ella okkurt ikki virkar eftir ætlan.

Flyting av óbrúktum fiskidøgum millum fiskiár
Í galdandi lóg er ásett, at umframt vanligu fiskidagarnar verða ásettir felags fiskidagar fyri bólkarnar 2-4 fyri tíðarskeiðið 1. okt. til 31. des. 2020, ið samsvarar við talið av fiskidøgum, sum hvør bólkur ikki brúkti í 2019. Henda skipan verður varðveitt, tó so at viðkomandi áseting í galdandi lóg verður umskrivað til eina heimild til landsstýrismannin at áseta skipanina í kunngerð.

Eyka fiskidagar fyri livur og annan innvøl
Síðani 2005 hevur í lógini verið sett av fiskidagatal, sum landsstýrismaðurin kann lata fiskiførum, ið avreiða livur. Við hesum uppskotinum verður henda skipan varðveitt. Tvær broytingar verða tó gjørdar: onnur er, at skipanin verður víðkað til eisini at fevna um annan innvøl. Skipanin er ætlað at stuðla undir, at tað mesta av fiskinum verður gagnnýtt, og at vit á tann hátt fáa størri úrtøku og virði fyri samfelagið. Hin broytingin er, at fiskidagatalið til livur o.a. ikki longur verður sett í lógina, men at landsstýrismaðurin ístaðin fær heimild at áseta dagatalið í kunngerð. Tó er sett ein avmarking í lógartekstinum, so at eyka fiskidagarnir í mesta lagi kunnu vera trý prosent av samlaða dagatalinum hjá hvørjum bólki.

Nýggjur bólkur fyri føroyskt bygdar bátar
Ætlanin er at skipa ein nýggjan bólk fyri opnar, føroyskt bygdar, bátar uttan fyri fiskidagaskipanina. Í tí sambandi er neyðugt at tillaga lógartekstin nakað, so at lógargrundarlagið undir samlaðu loyvisskipanini fyri útróðrarbátar undir 15 tons er greitt og gjøgnumskygt.

Verandi loyvisskipan fyri bólk 5 í fiskidagaskipanini er galdandi fyri allar bátar undir 15 tons. Skalt tú avreiða, krevst fiskiloyvi, og tað loyvið verður latið til fiskiskap undir fiskidagaskipanini, dagarnir tú brúkar vera roknaðir av dagatalinum hjá bólki 5 o.s.fr.

Eftir verandi lóg er loyvt at leggja tvey fiskiloyvi í bólki 5 saman á ein størri bát undir 15 tons. Hetta stuðlar undir møguleikarnar hjá teimum fullriknu at endurnýggja sínar bátar og at betra um raksturin, men tað kann gera, at fiskiloyvi hjá smærri opnum, føroyskt bygdum,

bátum í bólki 5 verða flutt á størri plastbátar, og at talið av føroyskum bátum í longdini kann minka.

Politiskt er ein slík gongd ikki ynskilig. Tí er ætlanin at broyta skipanina fyri útróðrarbátar undir 15 tons, soleiðis at opnir, føroyskt bygdir, bátar verða tiknir úr fiskidagaskipanini og skipaðir í ein nýggjan bólk fyri seg. Hetta verður gjørt við kunngerð, har treytirnar fyri at fáa fiskiloyvi koma at vera tær somu sum fyri bólk 5, og at aðrar reglur í høvuðsheitum fara at verða tær somu sum fyri bátarnar í bólki 5 undir fiskidagaskipanini. Høvuðsmunurin millum bólkarnar vera reglurnar um at flyta fiskiloyvi. Eigari av opnum, føroyskt bygdum, báti í nýggja bólkinum skal kunna skifta bátin út og flyta fiskiloyvið á nýggja bátin, er treytin um fiskiorku lokin. Men í kunngerðini fyri nýggja bólkin fer at verða ásett, at tað ikki verður loyvt at flyta tvey fiskiloyvi á bát við ongum fiskiloyvi. Hetta skal forða fyri, at smærri, føroyskt bygdir, bátar verða brúktir sum grundarlag undir veiðirættindum til størri plastbátar og at minka um óhepnu avleiðingarnar, hetta annars kann hava fyri siðbundna føroyska bátin og føroyskt bátasmíð.

Nýggi bólkurin verður skipaður í kunngerð. Hetta hevur landsstýrismaðurin longu heimild at gera eftir galdandi lóg. Men mett verður kortini neyðugt at tillaga lógartekstin nakað, so at lógargrundarlagið undir samlaðu loyvisskipanini fyri útróðrarbátar undir 15 tons er greitt og gjøgnumskygt.

Longd gildistíð á veiðirættindum
Sambært sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið at leingja gildistíðina á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 við einum ári. Hetta er gjørt við hesum uppskoti. Ásetingin fær gildi frá 1. januar 2021.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Vørn og Felagnum Trolbátar.

Viðmerkingar eru komnar frá Vørn og Fiskivinnuráðnum.

Ongar viðmerkingar eru tó til sjálvt innihaldið í uppskotinum, men báðir partar hava einstakar tekniskar viðmerkingar, sum eru tiknar við í uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur. Fyri landið er talan um nýggjar umsitingarligar uppgávur, nú skipanin fyri at áseta fiskidagar verður broytt, og nýggjar kunngerðir skulu gerast. Mett verður tó, at hetta kann gerast við tøkari umsitingarligari orku.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið, um at broyta mannagongdirnar fyri at áseta fiskidagar, verður ikki mett at hava fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Víðkaða skipanin, við at lata fiskiførum eyka fiskidagar, um tey avreiða livur o.a., kann stuðla undir eyka inntøkur,

samstundis sum skipini fáa eyka fiskidagar. Tað hevur eisini týdning fyri vinnuna, at gildistíðin á veiðirættindunum verður longd við einum ári.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at uppskotið hevur sosialar ella aðrar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar ella samstarv á fiskivinnuøkinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, herímillum Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan (EMRS) og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið kann elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Reglurnar um revsing eru í høvuðsheitum fylgibroytingar av teimum broyttu ásetingunum viðvíkjandi fiskidagaskipanini.

Umframt hesar broytingar verður heimild sett í lógina at revsa, um veiða frá ferðavinnufiskiskapi verður avreidd, og heimild verður sett at áseta revsing í kunngerð um ferðavinnufiskiskap. Hetta er dottið burturímillum, tá uppskotið til upprunalógina bleiv gjørt, og verður tí gjørt nú.

Harafturat verður revsing knýtt at nýggju kunngerðarheimildini um, at treytir kunnu setast til fiskifør.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki fólki nýggjar skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at áseta fiskidagar í fiskiskapi eftir botnfiski í føroyskum sjógvi og heimild at gera nærri reglur um, hvussu ásettu fiskidagarnir kunnu brúkast. Landsstýrismaðurin fær somuleiðis heimild at gera serliga skipan í fiskiskapinum hjá opnum, føroyskt bygdum, bátum undir 15 tons. Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleika atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Til nr. 1
§ 5, stk. 3
Skotið verður upp at geva landsstýrismanninum heimild at áseta treytir fyri fiskifør, minni enn 15 tons, í bólki 5 sambært § 18, stk. 1, nr. 5. Hesi fiskifør eru ikki fevnd av verandi krøvum til fiskifør í §§ 5 og 6 í løgtingslógini, tí tey hava ikki veiðiloyvi. Tørvur kann tó vera á at seta krav til sjálvt fiskifarið undir 15 tons fyri at fáa fiskiloyvi, eitt nú um siglingarloyvi frá avvarðandi myndugleika. Við hesum uppskoti fær landsstýrismaðurin møguleika at seta tílík krøv til smærru útróðrarbátarnar, har tørvur er á tí.

Til nr. 2
§ 7, stk. 1 og 2

Sambært § 7, stk. 3 skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið at leingja gildistíðina á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 við einum ári. Hetta verður gjørt við hesum uppskoti. Ásetingin fær gildi frá 1. januar 2021.

Til nr. 3
§ 13, stk. 1, nr. 1-5, § 21, stk. 1 og 3, § 22, stk. 3, § 28, stk. 2 og 3, § 30, stk. 1, § 32, stk. 1, 2 og 4, § 33, § 36, stk. 1, § 42, § 49, stk. 2 og 3, § 50, stk. 1 og 4.
Her er talan um eina fylgibroyting av broytingunum nr. 4-7.

Til nr. 4
§ 18, stk. 1 og 2
Stk. 1. Síðani 1996, tá fiskidagaskipanin varð sett í verk, hevur tað verið Løgtingið, sum við lóg hevur ásett fiskidagarnar fyri hvønn bólk í fiskidagaskipanini í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi. Hetta uppskotið ber í sær, at frá og við fiskiárinum 2021 fær landsstýrismaðurin heimild at áseta fiskidagatalið við kunngerð. Uppbýtið í bólkar er óbroytt og verður framhaldandi ásett við lóg. Tó verður skotið upp at nágreina hesa grein um bólk 5, útróðrarbátar undir 15 tons, so hon ikki fevnir um teir bátar undir 15 tons, sum eru í skipan fyri seg við heimild í § 22, stk. 4 í lógini uttan fyri fiskidagaskipanina. Broytingin hongur saman við, at ætlanin er at gera ein nýggjan bólk fyri opnu, føroyskt bygdu, bátarnar, sum í dag eru fevndir av bólki 5. Ásett verður somuleiðis, at fiskiskapur á Føroyabanka eisini frameftir verður skipaður fyri seg.

Stk. 2. Ásetingin sigur, hvør fær atgongd at fiska í fiskidagaskipanini. Verandi orðing er mest ein skiftisregla frá gomlu lógini, so at tey, ið undir gomlu lógini høvdu rætt til at fiska undir fiskidagaskipanini í 2019, kundu halda fram eftir 1. januar 2020. Við hesum uppskotinum verður greinin umorðað, so at atgongdin er avmarkað til tey, ið høvdu rætt til fiskidagar í 2019 ella tey, sum hesin rættur seinni er fluttur á.

Til nr. 5
§ 18, stk. 3
Hendan broytingin strikar orðingina “frá og við 2021”, sum ikki er neyðug, nú tað verður landsstýrismaðurin sum við kunngerð skal áseta fiskidagarnar. Ásett er framvegis, at tá landsstýrismaðurin ásetir fiskidagar, skal hetta gerast eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu.

Til nr. 6
§ 19
Yvirskipað ber broytingin í sær, at verandi grein 19 verður umorðað, so at landsstýrismaðurin fær heimildir at áseta fiskidagar og at fyrisita fiskidagaskipanina í føroyskum sjógvi, eins og hann hevur at skipa allan annan føroyskan fiskiskap. Summar av hesum heimildum hevur landsstýrismaðurin longu í galdandi lóg. Men uppskotið leggur upp til, at ásetingar í galdandi lóg, sum til dømis siga, hvussu ásettu dagarnir í hvørjum bólki kunnu brúkast, og sum yvirhøvur mest hava við sjálvan fiskiskapin at gera, verða umorðaðar til heimildir til landsstýrismannin at brúka, tá hann skipar fiskiskapin í árligu kunngerðini um fiskidagar.

Bólkauppbýtið í fiskidagaskipanini verður tó varðveitt í lógini, men verður sett inn í eina broytta grein 18 (sí broyting 4).

Stk. 1 heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri treytir um, hvar og hvussu ásettu fiskidagarnir, sambært grein 18, stk. 1, kunnu brúkast. Yvirskipaða endamálið við hesum reglum er at varðveita fiskidagaskipanina og tað bólkabýtið og tann flotabygnaðin, skipanin

byggir á. Hetta hevur serliga týdning, nú rúmari ræsur eru at avhenda veiðirættindi, eisini í fiskidagaskipanini.

Heimilað verður landsstýrismanninum at gera reglur um innaru og ytru fiskidagaleið, sum hava týdning í sambandi við at áseta fiskidagar og nýtslu og uppgerð av fiskidøgum. Tað snýr seg eisini um reglur fyri umbýti av fiskidøgum millum fiskileiðir og veiðihættir. Í verandi grein 19, stk. 2, 3. pkt. er heimild at gera reglur um umbýti av døgum millum innaru og ytru fiskidagaleið, og í grein 19, stk. 6 er heimild at áseta reglur um umrokning av døgum frá línu til snellu.

Fyri at forða fyri, at fiskidagaskipanin verður skeiklað, fær landsstýrismaðurin heimild at áseta treytir um, at fiskidagar í hvørjum bólki, sambært grein 18, stk. 1, bert skulu kunna brúkast við fiskiførum, sum eru innan fyri stødd og framtøkumegi og við tí veiðihátti, sum er tilskilaður fyri bólkin. Til dømis eru fiskidagar í bólki 2 mest ætlaðir til upsa og eru ikki ætlaðir til fiskiskap við minni fiskiførum inni á grunninum.

Í hesum sambandi kann tørvur eisini vera á at hava heimild at gera reglur, sum tryggja, at fiskidagar bert kunnu nýtast til fiskiskap á leiðum, har fiskifør við ávísari stødd ella við ávísari framtøkumegi hava loyvi at royna. Slíkar reglur skulu eitt nú forða fyri, at fiskidagar á djúpum vatni verða fluttir inn á grynri vatn og øvugt. Dømi um hetta kann vera fiskidagar, tillutaðir trolara í bólki 2, ið ikki skulu kunna brúkast til fiskiskap í kassunum, har bert fiskifør við framtøkumegi minni enn 500 HK hava loyvi at royna við troli. Annað dømi kann vera, at reglurnar um at avhenda fiskidagar ikki skulu føra við sær, at fiskidagar, tillutaðir línuskipum í bólki 3, verða brúktir við fiskiførum 90 tons ella minni innan fyri seks fjórðingar. Í kunngerð um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum, hevur í nógv ár verið ásett, at fiskifør, størri enn 90 tons, ikki hava loyvi at veiða við línu innan fyri 6 fjórðingar, og at fiskifør, millum 15 og 90 tons, sum hava egningarmaskinu, ikki hava loyvi at veiða við línu á leiðunum inni við land.

Harumframt er framvegis tørvur á reglum í sambandi við, at fiskifør í fiskidagaskipanini verða mátað upp av nýggjum ella skifta motor, sum ger, at fiskifarið fer út um ta avmarking, sum er fyri stødd og framtøkumegi fyri bólkin. Fiskifør kunnu fáa annað tonsatal við nýggjari uppmáting, uttan at tekniskar broytingar verða gjørdar við farið. Hetta skal ikki gera, at fiskifar av sær sjálvum skiftir bólk.

Stk. 2. Eins og í galdandi lóg verður heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá smærru útróðrarbátunum (bólkur 5) verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar bátar, og hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur. Sum nýggj áseting verður skotið upp at geva landsstýrismanninum heimild at áseta treytir fyri at fáa fiskiloyvi í bólki 5. Fyri at avmarka skaran av rættindahavarum í bólki 5, hevur í nógv ár verið ásett, at fiskiloyvi kann vera latið báti, sum er skrásettur í Føroyum áðrenn 1. januar 1995 ella í tíðarskeiðinum 1995-2002. Henda skipan fer rættiliga langt aftur í tíð og hevur stundum víst seg at vera heldur tung at umsita. Fyri at skipanin skal vera smidlig og greið at umsita, verður skotið upp at heimila landsstýrismanninum at seta nærri treytir fyri, hvør kann fáa fiskiloyvi í bólki 5 í fiskidagaskipanini.

Grundsjónarmiðið er, at tá heimildirnar í hesi grein verða brúktar, skal dentur eisini frameftir leggjast á at hava eina umsitingarliga skipan fyri smærru útróðrarbátarnar, sum leggur upp fyri, at driftin í bólkinum kann vera rættiliga ymisk frá einum tíðarskeiði til annað og millum

fiskiár, og har eitt hóskandi fiskidagatal verður sett av til fullriknu útróðrarbátarnar í bólkinum.

Stk. 3 er ein broyting av verandi grein 19, stk. 7, har fiskidagar verða settir av til at tilluta skipum og bátum, sum taka livur við til lands. Skipanin verður varðveitt, men uppskotið leggur upp til tvær broytingar: onnur er, at skipanin verður víðkað til eisini at fevna um annan innvøl. Hin broytingin er, at fiskidagatalið til endamálið ikki longur verður ásett í lógini, men at landsstýrismaðurin fær heimild at gera tað í kunngerð. Heimildin er tó avmarkað, so at eyka fiskidagarnir ongantíð kunnu vera meira enn tað, ið samsvarar við trý prosent av samlaða dagatalinum í hvørjum bólki. Hetta samsvarar eisini við upprunaligu ætlanina við livradøgum (sí løgtingsmál nr. 2/2005). Eins og í galdandi lóg hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta treytir fyri at fáa lut í hesum fiskidøgum.

Stk. 4. Henda áseting ber í sær, at skipanin, við at óbrúktir fiskidagar í einum fiskiári kunnu flytast til árið eftir, heldur fram. Í galdandi lóg er ásett, at umframt vanligu fiskidagarnar, verða ásettir felags fiskidagar fyri bólkarnar 2-4 fyri tíðarskeiðið 1. okt. til 31. des. 2020, ið samsvarar við talið av fiskidøgum, sum hvør bólkur ikki brúkti í 2019. Henda áseting verður við hesum uppskotinum umskrivað til eina heimild, so at skipanin frameftir verður sett í verk við somu kunngerð, sum ásetir fiskidagar og annað í tí sambandi.

Til nr. 7
§ 20
Eftir uppskotinum verður greinin, sum ásetir markið millum innaru og ytru fiskidagaleið, strikað. Nú fiskidagar ikki longur skulu ásetast við løgtingslóg, er ikki tørvur á at hava hesa allýsing í lógini. Eins og líknandi ásetingar um økisreguleringar í føroyskum sjógvi verður allýsingin av innaru og ytru fiskidagaleið frameftir ásett í kunngerð.

Til nr. 8
§ 22, stk. 1
Henda broyting hevur ongar avleiðingar fyri innihaldið í lógartekstinum. Hon er ein avleiðingarbroyting av broyting 6 og 10.

Til nr. 9
§ 22, stk. 4
Skotið er upp at seta inn nýtt stykki, sum gevur landsstýrismanninum heimild at skipa fiskiskapin hjá opnum, føroyskt bygdum, bátum undir 15 tons við serligum reglum og í einum bólki fyri seg uttan fyri fiskidagaskipanina. Hetta verður gjørt, tí mett verður, at tað er meira gjøgnumskygt at hava smærru bátarnar í eini heimild fyri seg og ikki undir generellu heimildini í grein 22, stk. 1. Orsøkin til ætlanina um at gera serstakar reglur fyri opnar, føroyskt bygdar, bátar er, at mett verður, at støðan og fyritreytirnar hjá hesum bátum ikki eru tær somu sum hjá størru bátunum í bólki 5, og at fiskiskapurin hjá hesum bátum tí eigur at skipast fyri seg. Flestu reglurnar fyri bátarnar í nýggja bólkinum verða tær somu, sum í dag eru fyri bátarnar í bólki 5. Treytirnar fyri at fáa fiskiloyvi verða tær somu, eins og aðrar treytir fyri sjálvan fiskiskapin, økisfriðingar, avreiðing o.tíl. verða tær somu. Høvuðsmunurin verður, at í nýggja bólkinum fer ikki at bera til at flyta tvey fiskiloyvi á bát við ongum fiskiloyvi. Eigari av opnum, føroyskt bygdum, báti í nýggja bólkinum kann skifta bátin út og flyta fiskiloyvið á nýggja bátin, treytað av, at fiskiorkan ikki gerst størri. Við hesum reglum verður eisini hugsað um støðuna hjá siðbundna føroyska bátinum og føroyskum bátasmíði.

Til nr. 10

§ 28, stk. 2
Reglan um fiskiorku hjá fiskiførum, sum hava rættindi at fiska botnfisk, ið er skipaður uttan fyri dagaskipanina, er í galdandi lóg ikki heilt tann sama sum í grein 21. Grein 21 tekur ikki við treytina um fiskiorku, tá fiskiskapur er skipaður við mest loyvdu veiðu og egnum árskvotum. Hetta undantakið er ótilætlað ikki tikið við í grein 28, stk. 2. Tí er skotið upp at umorða hesa greinina, so hon í innihaldi samsvarar við grein 21. Dømi um fiskiskap eftir botnfiski, sum er uttan fyri fiskidagaskipanina og heldur ikki avmarkaður við kvotum, er fiskiskapurin við gørnum eftir havtasku og svartkalva.

Til nr. 11
§ 28, stk. 5
Talan er um eina nágreining av verandi lógargrein, so hon samsvarar við upprunaligu ætlanina við ásetingini. Ætlanin er, at veiðiloyvið skal kunna seljast við fiskifari, tá fiskifarið skiftir eigara. Orðingin er tó vorðin ov avgjørd og verður tí linkað, so hon samsvarar við ætlanina.

Til nr. 12
§ 31, stk. 1, 2. pkt.
Her er talan um eina rætting, tí sum greinin nú er orðað, hevur tilvísingin til grein 22 við sær, at egin veiðirættindi í føroyskum sjógvi, fiskidagaskipanin undantikin, ikki kunnu avhendast. Hetta hevur ongantíð verið ætlanin. Hesi rættindi skulu kunna avhendast á jøvnum føti við onnur egin rættindi. Skotið verður tí upp at strika hesa áseting.

Til nr. 13
§ 32, stk. 3
Talan er um eina nágreining av verandi lógargrein, so hon samsvarar við upprunaligu ætlanina við ásetingini. Ætlanin er, at veiðiloyvið skal kunna seljast við fiskifari, tá fiskifarið skiftir eigara. Í upprunalógini er orðingin tó vorðin ov avgjørd og verður tí tillagað, so hon samsvarar við ætlanina.

Til nr. 14 og 15
§ 64, stk. 1 og 2
Talan er í høvuðsheitum um at broyta revsireglurnar, sum eru ein fylgja av broyting nr. 4-7.

Tó er eisini talan um eina tillaging viðvíkjandi ferðavinnufiskiskapi í § 35, har heimild nú verður sett inn at revsa, um veiða frá ferðavinnufiskiskapi verður avreidd, og heimild verður sett inn at áseta revsing í kunngerð um ferðavinnufiskiskap.

Heimild verður eisini at áseta reglur um revsing í kunngerð um treytir fyri fiskifør minni enn 15 tons.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó eru ásetingar, sum ikki koma í gildi fyrr enn 1. januar 2021. Talan er um § 1, nr. 2-10 í broytingaruppskotinum og nr. 14 og 15.

Hesar broytingar fevna um at leingja gildistíðina á rættindunum, heimildirnar hjá landsstýrismanninum at skipa fiskidagaskipanina í kunngerð og broytingar í revsiheimildunum viðvíkjandi hesum ásetingum.

Fiskimálaráðið, 03. november 2020

Jacob Vestergaard (sign.)
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Yvirlit yvir fylgiskjøl:

Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Frágreiðing og tilmæli frá arbeiðsbólkinum at gera uppskot til umsitingarætlan og at eftirmeta skipanina í fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum 6. mai 2019.
Fylgiskjal 3: Viðmerkingar frá Vørn
Fylgiskjal 4: Viðmerkingar frá Fiskivinnuráðnum